## Fløgan hjá Teiti kemur 1. mai

Leingi hevur verið bíðað í spenningi eftir nýggju fløguni hjá navnframasta føroyska tónleikaranum uttanlands, Teiti Lassen, og mánadagin 1. mai kemur Stay Under the Stars á marknaðin

FLØGUÚTGÁVA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru trý ár síðani, at fyrsta solofløgan hjá Teiti, Poetry & Aeroplanes, kom út, og tá var tað heimskenda útgávufelagið Universal Records í USA, sum stóð fyri útgávuni. Hesaferð hevur Teitur saman við umboðsmannni sínum sett á stovn sítt egna felag, ið hann rópar Arlo and Betty Recordings, sum hevur til endamáls at selja fløgurnar hjá Teiti til útgávufeløg kring allan heim. Felagið hjá Teiti hevur fingið sítt navn eftir teimum báðum sjáldsomu og høgt elskaðu Gibson-gittarunum, sum Teitur altíð hevur við sær kring heimin.

Nógvar konsertir á skránni

Nýggja fløgan, Stay Under the Stars, er tikin upp í Kensaltown upptøkuhølunum í London, og tað er sviin Martin Terefe, ið hevur ljóðblandað. Martin Terefe hevur áður ljóðblandað fløgur hjá til dømis heimskenda norska bólkinum A-Ha.

Hóast fløgan ikki kemur á marknaðin fyrr enn um eina góða viku, so leggur Teitur longu til brots við konsertferðini hjá sær hetta vikuskiftið.

Leygarkvøldið verður hann at hoyra í Fredericia, og sunnudagin og mánadagin skal Teitur spæla í Týsklandi, í ávíkavíst Berlin og München. Seinni í summar fer Teitur eisini at spæla í eitt nú Fraklandi, Svøríki, Spania og Føroyum. Higartil einasta konsertin hjá Teiti í Føroyum í summar er tann, sum hann skal hava á G! Festivalinum tann 22. juli.

# Atlantic Petroleum hækkar kapitalin




*Finn Danberg, fíggjarleiðari í Føroya Sparikassa, Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum og Per Højgaard, samskiftisfólk hjá Føroya Sparikassa greiddu á tíðindafundi fríggjamorgunin frá ætlanunum um at hækka kapitalin í Atlantic Petroleum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Um stutta tíð fer Atlantic Petroleum at gera størstu kapitalhækkingina í søgu felagsins. Hvussu stór hækkingin verður, ber ikki til at siga enn**

KAPITALHÆKKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Høvuðsorsøkin til at Atlantic Petroleum skal fremja eina stóra kapitalhækking er tann, at Ettrick-verkætlanin, sum Atlantic Petroleum er partur av, nú av álvara er farin í gongd, og í hesum sambandi skal føroyska felagið brúka fitt av peningi. Samlaða verkætlanin er upp á umleið hálvatriðju milliard, og parturin hjá Atlantic Petroleum er 8,3 prosent. Tað svarar til eina upphædd upp á umleið 200 milliónir krónur.

### Søgulig hending

Á tíðindafundi í Føroya Sparikassa fríggjamorgunin greiddu Wilhelm Petersen, stjóri í Atlantic Petroleum og Finn Danberg, fíggjarleiðari í Føroya Sparikassi, frá tilgongdini við at hækka kapitalin.

Atlantic Petroleum og Føroya Sparikassi hava í drúgva tíð arbeitt við hækkingini, sum er ein søgulig hending. Talan er nevnliga um fyrstu ferð, at eitt føroyskt felag, ið er skrásett á virðisbrævamarknaðinum, ger eina kapitalhækking.

Somuleiðis er talan um fyrstu ferð, at ein føroyskur fíggjarstovnur skal gera eitt prospekt fyri eitt felag, ið er skrásett á virðisbrævamarknaðinum, og tað er Føroya Sparikassi sera fegin um. Føroya Sparikassi skal standa fyri og veita trygd fyri kapitalhækkingini hjá Atlantic Petroleum.

- Vit eru sera fegin um loysa hesa sera týðandi uppgávu fyri Atlantic Petroleum. Tað er serstakliga spennandi at verða teir fyrstu, og á henda hátt fáa vit víst okkara styrki, sigur Finn Danberg, fíggjarleiðari í Føroya Sparikassa.

### Virðisbrævamarknaðurin setir treytir

Av tí at Atlantic Petroleum er skrásett á Virðisbrævamarknaði Føroya á ICEX, eru tað ávísar treytir, ið skulu fylgjast í sambandi við eitt nú kapitalhækking.

Millum annað skuldi ICEX hava fráboðan um kapitalhækkingina, áðrenn fjølmiðlarnir og almenningurin blivu kunnaðir um hana. Av somu orsøk var tíðindafundurin í morgun ikki fráboðaður fyrr enn í nátt, og fundurin byrjaði ikki fyrr enn klokkan var 10.15, tí tá var Virðisbrævamarknaðurin latin upp, og fráboðanin lá á heimasíðuni hjá ICEX.

### Trý-siffrað milliónaupphædd

Tað er lítið at ivast í, at talan verður um eina trý-siffraða milliónaupphædd, sum kapitalurin hjá Atlantic Petroleum verður hækkaður við.

Wilhelm Petersen greiddi á tíðindafundinum í morgun frá, at hækkingin verður munandi størri enn tann størsta, sum felagið áður hevur gjørt, og tann hækkingin var umleið 70 milliónir krónur.

Samstundis var eisini greitt frá, at kapitalhækkingin skal verða við til at fíggja tær 200 milliónirnar, sum skulu nýtast í sambandi við Ettrick-verkætlanina, og eisini til at fíggja nýggj keyp hjá Atlantic Petroleum. Havandi hetta í huga er lítið at ivast í, at talan verður um eina rættuliga stóra kapitalhækking.

Men tann nágreiniliga upphæddin verður tó ikki almannakunngjørd, fyrr enn endaliga prospektið verður liðugt. Nær hetta verður, er ikki heilt greitt enn, men sagt verður, at ætlanin er at fremja kapitalhækkingina í øðrum ársfjórðingi í ár, og tað merkir, at hon skal verða gjørd innan 1. juli.

Føroya Sparikassi og Atlantic Petroleum eru tó við at verða liðug við at gera prospektið, men áðrenn tað verður alment, skal prospektið gjøgnum eina góðkenningartilgongd hjá ICEX.

### Útlendskir keyparar

Spurningurin er so, um vandi er fyri, at útlendingar fara at liggja framvið, tá ið kapitalhækkingin verður gjørd, og um felagið á henda hátt er í vanda fyri at fara á útlendskar hendur.

- Tað er ein ávísur áhugi uttanlands fyri at gera íløgur í Atlantic Petroleum, men viðtøkur felagsins siga, at verandi partaeigarar hava framíhjárætt til at keypa partabrøv, sigur Wilhelm Petersen.

